# Hann fær løn úr USA

**Irakski tjóðskaparflokkurin fær meiri enn tvær milliónir krónur um mánaðin úr amerikanska ríkiskassanum aftur fyri fregnartænastuupplýsingar. Formaður í flokkinum er Ahmed Chalabi**

SAMSÝNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ahmed Chalabi er fyrr lagdur undir at hava givið amerikanarunum villleiðandi upplýsingar um hópoyðingarvápnini, sum Irak varð sagt at hava, eins og hann skal hava sagt ósatt um sambandið millum Irak og altjóða yvirgangsbólkar.

Chalabi búði í útlegd undan krígnum í Irak. Í Jordan er hann dømdur 22 ára fongsul fyri svik og fíggjarundandrátt, men tá amerikanska stjórnin fyrireikaði álopið á Irak, var Chalabi ímillum teirra, sum dúgliga vitjaðu í Washington. Í dag er Ahmed Chalabi limur í stjórnarráðnum, sum USA hevur mannað, og hann fær framvegis løn úr USA.

Undir einari hoyring í Senatinum fyrr í vikuni vildi senatorurin Hillary Clinton hava at vita, um Ahmed Chalabi og flokkur hansara fáa pengar úr USA. CIA-ovastin, George Tenet, svaraði, at teir fáa ikki pengar frá CIA. Hillary Clinton setti síðani ovastanum fyri fregnartænastuni hjá herinum sama spurning.

– Tú hevur sett meg í eina støðu, sum krevur, at dyrnar verða latnar aftur, svaraði Lowell Jacoby, varaadmiralur.

Ónevndir amerikanskir embætismenn upplýstu seinni, at Chalabi og flokkur hansara fáa góðar tvær milliónir krónur um mánaðin um mánaðin úr amerikanska ríkiskassanum.



*Ahmed Chalabi. Tað er ikki greitt, um Colin Powell, uttanríkisráðharri, tekur undir við at geva honum løn. Fyri einum ári síðani segði Powell, at hann hevði einki álit á irakum, sum gingu í klædningi og við Rolex-uri um skøvningin. Hann sipaði til Chalabi*



*Bush, forseti skal nú greiða frá, hví amerikonsku fregnartænasturnar ikki megnaðu at forða fyri atsóknini 11. september í 2001*

# Bush skal avhoyrast um 11. september

**George W. Bush, forseti, hevur forðað fyri, at umstøðurnar í sambandi við atsóknina tann 11. september í 2001 verða kannaðar. Nú hevur hann játta at lata seg avhoyra um málið**

11. SEPTEMBER
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Demokratiska valevnið, John Kerry, fanst mikudagin at Bush, forseta og legði hann undir at misbrúka atsóknina tann 11. september í 2001 í valstríðnum upp undir forsetavalið í heyst. Samstundis fýltist hann á, at forsetin hevur sagt seg ikki hava stundir til at greiða einari óheftari nevnd frá, hvat amerikonsku myndugleikarnir vistu undan atsóknunum.

– Hevur forsetin stundir til at vitja eina ríðikapping, hevur hann eisini tíð til at greiða frá, hví fregnartænastan ikki var sína uppgávu vaksin, segði John Kerry við CNN og sipaði til, at Bush júst hevði verið til eina ríðikapping í Houston.

Um tað var atfinningin hjá John Kerry, sum fekk Bush at broyta hugsan, er ikki greitt, men í hvussu er kunngjørdu Hvítu Húsini í gjár, at forsetin er til reiðar at svara spurningum frá teirri óheftu nevndini.

Eygleiðarar í Washington siga, at Hvítu Húsini hava víst lítlan áhuga fyri at samstarva við kanningarnevndina, sum Kongressin setti fyri tveimum árum síðani. Fyrst royndi forsetin at forða fyri, at nevndin bleiv sett, og síðani hevur hann sýtt fyri at lata nevndini skjøl í málinum, og hann vildi heldur ikki lata nevndina avhoyra seg. Trygdarpolitiski ráðgevi forsetans, Condollezza Rice, sýtir framvegis fyri at lata seg avhoyra.

Tá tað herfyri eydnaðist nevndini at fáa fatur á 60 síðum við loyniligum upplýsingum um 11. september, tryggjaði forsetin sær, at bara formaðurin og næstformaðurin í nevndini sluppu at lesa tey. Hinir nevndarlimirnir máttu taka til takkar við einum samandrátti, sum var 17 síður.

Ætlanin er, at kanningarnevndin skal leggja sína frágreiðing fram í juli. Hon kann fáa týdning fyri valið í heyst.

# Blóðugur yvirgangur í Evropa

**Minst 131 fólk doyðu í einari røð av bumbuspreingingum á tokstøðum í Madrid gjáramorgunin. Spanska stjórnin gevur baskiska loysingarfelagsskapinum ETA skyldina**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bumburnar raktu tríggjar tokstøðir og minst tvey tok, og tær brustu at kalla samstundis á jarnbreytarteininum ímillum Madrid og Guadaljara stutt eftir klokkan hálvgum átta.

Í einum toki, sum júst kom til jarnbreytarstøðina Atocha, vórðu tveir vognar sprongdir í luftina, og sambært myndugleikunum doyðu minst 29 av teimum, sum vóru í vognunum.

Um somu tíð brustu bumbur á tokstøðunum Pozo de Tio Raimundo og Santa Eugenia tætt við Madrid, og her doyðu ávikavist 18 og 15 fólk. Lítla løtu seinni var ein spreinging umborð á einum toki, sum var komið úr Alcala de Hemares, men her fekk eingin skaða.

Sponsku myndugleikarnir høvdu ávarað um vandan fyri yvirgangi upp undir valið sunnudagin. Sambært sponskum fjølmiðlum skal spanska fregnartænastan hava hoyrt eina telefonsamrøðu, sum avdúkaði, at baskiskir loysingarmenn høvdu rænt eitt tons av dynamitti í Fraklandi fyri stuttum, og at teir eisini høvdu útvegað sær spreingievni úr Eysturevropa.

Var tað ETA, sum skipaði fyri atsóknini í gjár, er hetta tann blóðugusta atsóknin hjá felagsskapinum, síðani hann fór undir tað vápnaða stríðið ímóti myndugleikunum í 1968.

# ítróttur

Nr. 50 • fríggjadagur • 12. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nýtt venjarapar hjá Kyndli

**Kári Nielsen og Birgir Hansen skulu standa á odda fyri mansliðnum hjá Kyndli seinastu fýra umførini**

HONDBÓLTUR
*jákup Mørk*
*jakuð@sosialurin.fo*



*Jan Djurhuus er ikki longur venjari hjá Kyndli. Tað verða ístaðin Kári Nielsen og Birgir Hansen, sum hava hesa uppgávuna í seinastu fýra dystunum*

Sum vit skrivaðu í mikudagsútgávu okkara, so mundi venjarin hjá besta mansliðnum hjá Kyndli, Jan Djurhuus, eiga ein tann leysasta venjarasessin í landinum.

Hóast liðið framvegis liggur á fremsta plássinum í deildini, so var stór ónøgd um venjaran í leikarahópinum, og tað var væntandi, at hetta fór at fáa avleiðingar fyri samstarvið við venjaran.

Og nú er so eisini staðfest, at hetta gjørdist veruleiki. Seinnapartin mikudagin sendi Kyndil út tíðindaskriv har fylgjandi staðfesting var ein partur av innihaldinum:

»Hjá monnunum er eisini hend ein broyting. Jan Djurhus, sum byrjaði sum venjari í felagnum 1. juli í fjør, er nú eftir samráð við nevndina givin í felagnum. Restina av kappingarárinum taka Kári Nielsen og Birgir Hansen sær av mansdeild Kyndils. Teir eru báðir gamlir kenningar í felagnum.«

Við hesum báðum monnunum hevur Kyndil í øllum førum fingið eitt venjarapar, sum áður hevur víst, at teir megna at taka stór tók fyri felagið. Kári Nielsen fekk framúr úrslit í fjør, tá hann í endaspælinum var partur av venjarateaminum í felagnum, og var tað ikki fyri minni góðu úrtøkuna í grundspælinum, so kundi væl verið, at Kyndil umframt steypasigurin eisini hevði vunnið sær gullmerki ta ferðina.

Ikki minst tykist sterka útstrálingin hjá fyrrverandi fyrstudeildarkempuni at gera stóran mun, og tað er kanska meira enn nakað júst hesin eginleikin, sum Kyndil hevur størstan tørv á í løtuni, soleiðis at stríðsviljin, sum annars hevur eyðkent liðið, kann finnast fram aftur til seinastu avgerandi dystirnar.

### Øgiligur spenningur

Og so er spurningurin, hvørt teir báðir nýggju venjararnir megna at draga Kyndil seinsta pettið fram móti gullmerkjunum, sum teir hava havt útlit til alt kappingarárið.

Manskappingin er í løtuni mitt í mest spennandi endaspurtinum í mannaminni, har fýra tey ovastu liðini øll hava møguleika at taka stig frá hvørjum øðrum.

Her hevur Kyndil í løtuni bestu kortini. Ikki bara tí teir hava tvey stig fleiri enn næstu kappingarneytarnir, men eisini tí teir á pappírinum bert hava VÍF og Neistan eftir av oddaliðunum. Tað hevur StÍF eisini, men teir eru so trý stig aftanfyri oddaliðið. Og so hava Neistin og VÍF – umframt innanhýsis dystin – bæði Kyndil og StÍF eftir á skránni.

# 35 svimjarar til Køge Open

**Stór føroyskt ferðalag fer í næstum til Danmarkar at taka lut í stórari svimjikapping**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Stóra svimjikappingin ið nevnist Køge Open verður í døgunum 26. til 28. mars í Køge í Danmark, og fara 35 føroyskir svimjarar at taka lut. Føroysku svimjararnir fara úr Føroyum 23 mars og koma aftur 29 mars. Fyrstu dagarnir verða brúktir til venjingar.

Svimjarar úr Føroyum vóru eisini til hesa kapping síðsta ár og varð úrslitið gott.

Flestu svimjararnir, ið fara úr Føroyum eru úr yngru aldursbólkunum. Elsti svimjarin er føddur í 1987 og tann yngsti í 1994. Til samans telir føroyska ferðalagið 47 fólk, og eru teir 35 svimjararnir hesi:

**Havnar Svimjifelag:**
Lisbeth L. Joensen
Elida Bjarnadóttir
Bjørg Seloy
Hildur á Fløtti
Helena Gunnarsdóttir
Dagmar Malena.Winther
Høgni M.Rasmussen
Hanus Eysturdal
Petur McIntosh

**Tvøroyrar Svimjifelag:**
Jutta Thomsen
Malan Bærentsen
Hildibjørg Joensen
Maria Vang
Anna Kristina Eysturberg
Elisabeth Bærentsen
Mona Simonsen
Malan Michelsen
Gunnleif Olsen

**Vágs Svimjifelag:**
Rakul Haurits
Aster Thorsen
Sissal Petersen
Helena Strøm



*Tá føroyskir svimjarar í fjør tóku lut í Køge Open, varð talan um eitt gott samlað úrslit*

**Skeggjar**
Elspa Mørkøre
Eyðbjørg Petersen
Heidi Strømsten
Kirsten Rasmussen
Kári J. á Høvdanum

**Flot**
Per S. Hansen
Beinir Danielsen
Arnold Davidsen
Remi Langgaard
Jóhan Símin Edmundsson

**Fuglafjarðar Svimjifelag**
Jákup Øssursson Mohr
Pauli Øssursson Mohr